

# Eingin oljuboring í Eysturgrønlandi fyrr enn um 8-10 ár

**Jan Müller**

03.01.2014 - 14:05

Oljan.fo

Tað fara helst at ganga upp til 8 til 10 ár, áðrenn borurin verður settur í undirgrundina í Eysturgrønlandi. Hetta upplýsir grønlendka ráevnisfyrisitingin stutt eftir, at hon herfyri kunngjørdi, at níggju oljufeløg høvdu fingið tillutað leitiloyvi í Eysturgrønlandi.

Um somu tíð vil ráevnisfyrisitingin eisini sissa tey, sum bera ótta fyri umhvørvinum í Eysturgrønlandi. Herfyri móttmælti Greenpeace nýggju loyvunum og segði, at hvørki oljufeløg ella myndugleikar eru klár til tacla møgulig óhapp og dálking.

Greenpeace sigur, at grønlendska landsstýrið spælir hazard við umhvørvinum, tá tað letur slík leitiloyvi.

“Nýggju loyvini eru latin til fleiri av heimsins størstu oljufeløgum, sum hava drúgvar royndir at arbeiða í Arktis og hava orð fyri at seta trygdina í hásæti,” sigur Jørgen Hammeken-Holm, sum er settur stjóri fyri Ráevnisfyrisitingina.

Hann vísir á, at myndugleikarnir skulu góðkenna boriverkætlanir og tilbúgvingarætlanir, áðrenn farið verður í gongd.

Greenpeace hinumegin vísir á, at tað er eitt ávaringartekin, tá eitt felag sum Maersk als ikki er við í Eysturgrønlandi. Eisini hevur amerikanska ExxonMobil tikið seg aftur úr Grønlandi umframt at feløg sum Total hava ávarað ímóti oljuboring í Arktis.

Leitiloyvini í Eysturgrønlandi vórðu upprunaliga ætlað at vara í 10 ár, men fyri at vekja størri áhuga vórðu tey longd til 16 ár. Loyvi í Vesturgrønlandi eru fyri 10 ár.

Roknað verður við at oljufeløgini fara at brúka nógva orku til at menna tøknina, sum krevst fyri at gera seismiskar kanningar í ísøkjunum í norðara partinum av Eysturgrønlandi.